Jørgen Niclasen tikið ræði á 6.600 tonsum av svartkjafti

– Ger landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum mismun á skipunum, sum fiska svartkjaft, vil Kristina Háfoss hava at vita

Kristina Háfoss vil hava at vita, um ætlanin er at geva Næraberg svartkjaftakvotu framíhjá, sum hini skipini ikki hava møguleika at fáa lut í

SVARTKJAFTUR
Áki Bertholdsen

Eru øll tey føroysku skipini, sum fiska svartkjaft, líka fyri lógini, ella er landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum við til at avlaga kappingina ímillum skipini.

Hetta eru spurningar, sum Kristina Háfoss, løgtingskvinna fyri tjóðveldisflokkin, nú vil hava greiði á.

Hon hevur tískil sett Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, nakrar skrivligar fyrispurningar í tinginum um fiskiskapin hjá føroyskum skipum eftir svartkjafti.

Fyrispurningarnir verða lagdir fyri Løgtingið fyrsta dagin.

Orsøkin til, at hon reisir spurningin, er, at týsdagin gjørdi Fiskiveiðieftirlitið av at steðga øllum føroyskum fiskiskapi eftir svartkjafti.

Hetta varð gjort við støði í eini kunngerð, har tað verður staðfest at felagskvotan fyri svartkjaftafiskiskapin í ár er 193.400 tons.

Fiskivieiðieftirlitið boðaði frá, at nú eru tey 193.440 tonsini fiskað og tí fingu tey bæði skipini, ið vóru úti, Næraberg og Tróndur í Gøtu, boð um, at steðga fiskiskapinum í stundini.

Tekur ræði á 6.600 tonsum

Kristina Háfoss vísir á, at í ár er svartkjaftakvotan hjá føroysku skipunum 200.000 tons.

– Av teimum 200.000 tonsunum, hevur landsstýrismaðurin gjørt av, at 193.400 tons skulu vera felagskvota.

Hinvegin hevur Jørgin Niclasen tilskila sær rætt til sjálvur at ráða yvir hinum 6.600 tonsunum av kvotuni.

Kristina Háfoss vil hava at vita, hvørja lógarheimild, landsstýrismaðurin hevur at taka sær ræði á einum parti av svartkjaftakvotuni.

Hon vísir á, at skipini, sum hava loyvi at fiska svartkjaft, hava øll loyvi at fiska av felagskvotuni, uttan nøgdaravmarkingar.

Kristina Háfoss vil tí hava at vita, hvørja grundgeving landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur til at taka 6.600 tons burturav svartkjaftakvotuni til sín sjálvs at ráða yvir, heldur enn at lata tey vera ein part av felagskvotuni.

Hon vil eisini hava at vita, um hetta ikki er brot á javnbjóðisrættindini hjá skipum, ið royna eftir svartkjafti.

Til Næraberg?

Hon vísir eisini á, at øll skipini, sum fiska svartkjaft, uttan Næraberg, hava eisini silda- og makrelkvotur til góðar, sum tey kunnu troyta tað, ið eftir er av árinum.

Hon vil tí hava at vita, um tað er ætlanin at lata Nærabergi tey 6.600 tonsini av svartkjafti, sum landsstýrismaðurin hevur tikið sær ræði á.

Og er tað so, vil hon hava at vita, hvør grundgevingin er, og um hetta ikki er kappingaravlagandi og brot á javnbjóðisrættindini hjá skipunum, ið fiska svartkjaft.

Tey eldru í Havn skulu hava ráð

Leivur Hansen, býráðslimur, mælir nú til, at eldraráð verður sett á stovn í Havn

ELDRARÁÐ
Áki Bertholdsen

Nú skulu vit hava eitt eldraráð í Tórshavnar Kommunu.

Tað heldur í hvussu so er Leivur Hansen, býráðs-limur.

Hann hevur nú mælt býráðnum til at seta á stovn eitt eldraráð í kommunun og uppskotið er nú til viðgerðar í umsitingini hjá Býráðnum,

Leivur Hansen vísir á, at Landsstýrið hevur boðað frá, at eldraøkið skal leggjast út til kommunurnar at reka og umsita og tað verður væntandi frá 1. juli næsta ár.

Hann sigur tí, at tað er ikki annað enn rætt og rímiligt, at eitt eldraráð verður sett á stovn.

– Tað er onki forgjørt í, at kommununan longu fer undir fyrireikingarnar til at átaka sær uppgávuna at røkja eldraøkið eisini, heldur hann.

– Aðrastaðni, har kommun-ur umsita hetta økið, eru slík eldraráð heilt vanlig.

Hann sigur, at endamáli við einum slíkum ráði er, at tað skal skal vera ráðgevandi myndugleikanum í málum, ið viðvíkja teimum eldru.

Góða undirtøku

Leivur Hansen ivast ikki í, at uppskotið fær góða undirtøku.

Hann vísir á, at í eldraálitinum, sum ein arbeiðsbólkur gjørdi fyri Tórshavnar kommunu í 1998, verður mælt til at seta tílíkt ráð á stovn at vera bindiliið millum borgararnar og býráðið á eldraøkinum. Býráðið skal við øðrum orðum hoyra eldraráðið um allar politiskar ætlanir, ið viðvíkja teimum eldru.

– Býráðið, sum tá var, samtykti einmælt, at brúka álitið til grundarlag undir framtíðar arbeiðnum hjá kommununum á eldraøkinum.

– Og nú Landsstýrið hevur boðað frá, at ítøkiligar ætlanir er um at leggja málsøkið út til kommununar, er stundin komin til at fylgja omanfyrinevnda tilmæli, heldur Leivur Hansen.

Og í eldraálitinum, sum beint nú er komið, verður eisini mælt til at seta slík eldraráð á stovn.

Býráðslimurin hevur ikki gjørt sær so nógvar tankar um, hvør skal sita í einum slíkum ráði.

Sum hann hevur skilt, verða slík ráð aðrastaðni vald við beinleiðis fólkaatkvøðu.

Men tað heldur hann ikki skuldi verið neyðugt í Føroyum.

– Uttan iva ber tað til at velja eitt slíkt ráð, uttan at skipa fyri fólkaatkvøðu. Tað kunnu kanska vera feløg og stovnar, sum hava við eldri at gera, eitt nú pensjonistafelag, Tilhaldið og onnur, sum velja limir í ráðið.

Hvørki Klaksvík ella Vágur fáa nakran kommunulækna afturat fyribils

Bara tveir kommunulæknar eru í Klaksvík í løtuni. Eftir ætlan skuldi triði læknin, sum higartil hevur starvast í Vági, taka við 1.oktober, men hetta er nú fyribils útsett. Og eingin kommunulækni er settur í starv í Vági, sum tískil bara hevur ein kommunulækna í løtuni

HEILSUMÁL
Jón Brian Hvidtfeldt

Í løtuni standa kommunulæknastørv tóm, bæði í Klaksvík og í Vági. Eftir ætlan skuldi tann eini kommunulæknin, sum hevur starvast í Vági, taka við kommunulæknastarvi í Klaksvík 1.oktober, men hetta er útsett í óásetta tíð. Og fyribils verður heldur eingin annar kommunulækni settur í starv í Klaksvík. Samtíðis stendur starvið, sum kommunulæknin í Vági er farin úr, framvegis tómt, og heldur ikki her røkist nakað fyri, at tað starvið verður sett.

Læknin í Vági, sum upprunaliga skuldi taka við stavi í Klaksvík 1.oktober, er fyribils sjúkrameldað. Samtíðis kannar Landslæknin framvegis hennara embætisførslu, meðan hon hevur verið kommunulækni í Vági. Orsøkin er hendingin herfyri, tá læknin sovnaði, meðan hon var í læknaørindum at skriva eina deyðsváttan.

Landslæknin skal geva øllum læknum »autorisatión«, tvs. at hann skal góðkenna teirra læknaliga fakleika. Samtíðis er Trivnaðarmálaráðið setanarmyndugleiki, m.a. hjá kommunulæknum, og tað kann gera støðuna eitt sindur fløkta, sigur Aibritt á Plógv, aðalstjóri í Trivnaðarmálaráðnum.

- Í løtuni bíða vit eftir, hvørja niðurstøðu Landslæknin kemur til. Nú er læknin, talan er um, sjúkrameldað í løtuni, og tí kann tú siga, at hon ikki kundi tikið við starvinum í Klaksvík 1.oktober kortini, men í løtuni er eitt sindur ringt at siga, hvar málið flýtur, sigur Aibritt á Plógv. Hon leggur afturat, at Trivnaðarmálaráðið hevur valt at bíða eftir Landslæknanum, og tí niðurstøðu hann kemur til. Tí verður fyribils eingin kommunulækni settur í starv afturat í Klaksvík, hóast triðja kommunulæknastarvið í læknadømunum skuldi mannast aftur 1.oktober.

Aibritt á Plógv sigur, at Trivnaðarmálaráðið fer at taka setanina av kommunulæknanum í Klaksvík uppí næstum fer at taka málið upp við Landslæknan, fyri at vita, um mannagongdirnar møguliga kunnu broytast.

Setaninar kunnu draga út

Maria á Dul, starvsfólkastjóri í Trivnaðarmálaráðnum, sigur, at setanin av kommunulæknanum í Klaksvík kann draga út. Eisini hon vísir á, at kommunulæknin, sum skuldi taka við starvinum í Klaksvík 1.oktober, er sjúkrameldað.

- Eg kann bara siga so mikið, at setanin er útsett í løtuni. Tað er ilt at meta um, nær kommunulæknastarvið í Klaksvík verður mannað, tað vil bara tíðin vísa, sigur Maria á Dul. Í løtuni verður bíðað eftir, hvørja niðurstøðu landslæknin kemur til, og síðan fer Trivnaðarmálaráðið at taka støðu út frá tí, hvørt fyrrverandi læknin í Vági skal setast í starv í Klaksvík, ella farast skal at leita eftir einum øðrum lækna. Maria á Dul væntar, at ein ábending fæst um hetta, tá hesin mánaðin er av.

Samtíðis sum setanin av triðja kommunulæknanum í Klaksvík dregur út, gongst illa at fáa nakran lækna til Vágs. Starvið, sum læknin, ið skuldi fara til Klaksvíkar, er farin úr, stendur enn tómt. Maria á Dul sigur, at trupult er at finna nakran lækna til kommunulæknastarvið í Vági, og hon dugir tískil ikki at meta um, nær starvið verður sett. Í løtuni er sostatt bara ein kommunulækni í Vági. Á Tvøroyri, har tveir kommunulæknar eisini eiga at vera, er støðan at kalla tann sama. Annar av kommunulæknunum hevur í eina tíð verið sjúkur, og er framvegis so illa fyri, at hann ikki fær tikið vaktir, og tí eru bara tveir læknar til alla Suðuroynna.

- Tað vísir seg, at trupulleikar eru at manna kommunulæknastørvini, at kalla alla staðni í landinum, sigur Maria á Dul, starvsfólkastjóri í Trivnaðarmálaráðnum.

Tað er landslæknin, sum gevur »autorisatión«, t.v.s. góðkennir læknan fakliga, og Trivnaðarmálaráðið kann ikki gera annað enn fylgja honum.

Læknin, sum talan er um, er amerikanari og hevur fingið autorisatión fyri halvt ár í senn. Kravt verður millum annað, at fyri at vera lækni í danska kongaríkinum, skal viðkomandi duga danskt.

Aibritt á Plógv sigur, at hon veit ikki, um hesin læknin dugir danskt. Men hon dugir føroyskt.

Í løtuni er støðan í málinum tann, at Suðuroyar sunnar helvt hevur ongan lækna, tí hin læknin har suðuri er í summarfrí.

Trivnaðarmálaráðið hevur fyribils loyst annan kommunulæknan í Vági úr starvi. Læknin skuldi tann 1. oktober taka við kommunulæknastarvi í Klaksvík, men tað er útsett, meðan ymisk viðurskifti við embætisførsluni í Suðuroy verða kannað

Meðan eingin lækni er í Suðuroyar sunnaru helvt, mugu fólk venda sær til lækna á Tvøroyri ella til Sjúkrahúsið

Heilsumál

Annar kommunulæknin i Vági er fyribils loystur úr starvi. Embætisførslan hjá læknanum verður kannað, og setan í kommunulæknastarv í Klaksvík er fyribils útsett, meðan viðurskifti læknans verða viðgjørd, sigur aðalstjórin í Trivnaðarmálaráðnum.

Aibritt á Plógv, aðalstjóri í Trivnaðarmálaráðnum, sigur, at grundin tí avgerðina hjá ráðnum er tann umrøðan, sum týsdagin var í Sosialinum av einum ávísum máli, har kommunulæknin í Vági var uppií.

– Eingin beinleiðis klaga um læknan er komin til Trivnaðarmálaráðið, sigur Aibritt á Plógv. Onkur einstakur persónur hevur fingt til okkara, men vil ikki leggja navn til nakra klagu. Men tá málið varð alment gjøgnum fjølmiðlarnar, varð gjørt av at kanna tað, og læknin varð biðin um at fara heim at hvíla seg, teir dagarnar, hon hevur eftir í starvinum í Suðuroy. Hon skuldi annars tann 1. oktober flyta í kommunulæknastarv í Klaksvík.

Aibritt á Plógv sigur, at Trivnaðarmálaráðið hevur verið í samband við læknan, og avtalað er, at læknin skal møta á fundi í Trivnaðarmálaráðnum komandi mánadag, har tosast skal um viðurskiftini.

Trivnaðarmálaráðið er setanarmyndugleiki hjá kommunulæknunum og kann eisini loysa teir úr starvi, meðan landslæknin hevur eftirlitsmyndugleikan.

Aibritt á Plógv sigur, at landslæknin eisini kannar hetta málið í løtuni, og vónar hon, at tann kanningin er liðug til mánadagin, so hon eisini kann verða viðgjørd á fundinum millum læknan og Trivnaðarmálaráðið.

Tað er landslæknin, sum gevur »autorisatión«, t.v.s. góðkennir læknan fakliga, og Trivnaðarmálaráðið kann ikki gera annað enn fylgja honum.

Læknin, sum talan er um, er amerikanari og hevur fingið autorisatión fyri halvt ár í senn. Kravt verður millum annað, at fyri at vera lækni í danska kongaríkinum, skal viðkomandi duga danskt.

Aibritt á Plógv sigur, at hon veit ikki, um hesin læknin dugir danskt. Men hon dugir føroyskt.

Í løtuni er støðan í málinum tann, at Suðuroyar sunnar helvt hevur ongan lækna, tí hin læknin har suðuri er í summarfrí.

Mánadagin skal tann nú fyrrverandi Suðuroyar læknin koma við síni frágreiðing til Trivnaðarmálaráðið, sum so fer at gera av, um norðoyingar fáa ein avloysaralækna afturat frá 1. oktober ella ikki.

Sandingar fáa nú aftur lækna, men framvegis bara ein

Ein avloysari fór hósdagin til Sandoynna, sum seinastu dagarnar hevur ligið í læknaloysi. Hann skal vera í oynni til leygarkvøldið, og mánadagin fáa sandingar sín lækna aftur. Men hóast Sandoyggin, saman við Skúgvoynni, hevur rætt til tveir kommunulæknar, røkist einki fyri hesum

HEILSUMÁL
Jón Brian Hvidtfeldt

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Sandoyggin í eina tíð hevur ligið í læknaloysi. Kommunulæknin í oynni, Andreas Hans Anthonius, hevur verið í feriu í tvær vikur, og kemur ikki aftur fyrr enn mánadagin. Tí hevur eingin lækni verið í oynni, og sandingar hava tískil verið noyddir at farið norður til Havnar til lækna.

Maria á Dul, starvsfólkastjóri í Trivnaðarmálaráðnum, sigur, at ein misskilji millum Trivnaðarmálaráðið og kommunulæknan hevur gjørt, at eingin lækni hevur verið í oynni seinastu dagarnar, og tað er sera óheppið. Maria á Dul sigur, at tey nú hava fingið avtalu við Anfinn Rubek Nielsen, sum áður hevur verið lækni á Sandi, um at røkja læknastarvið á Sandi til leygarkvøldið. Anfinn Rubek Nielsen skuldi fara í Sandoynna hósdagin. Og mánadagin kemur so Andreas Hans Anthonius aftur í sítt kommunulæknastarv, sum hann hevur røkt síðan marts mánað.

Sandoyar læknadømi, sum eisini fevnir um Skúvoynna, hevur rætt til tveir kommunulæknar, men einki røkist fyri, at tveir læknar aftur koma í oynna.

- Tað vísir seg at vera sera trupult at finna nakran lækna til starvið, sum stendur tómt í Sandoynni, sigur Maria á Dul. Hon leggur afturat, at Trivnaðarmálaráðið søkir eftir kommunulæknum alla tíðina, men áhugin fyri størvunum tykist vera sera lítil. Starvsfólkastjórin í Trivnaðarmálaráðnum kann tí ikki lova, um ella nær tveir kommunulæknar aftur vera í Sandoynni.

At bara ein kommunulækni er í Sandoynni merkir, at hesin skal hava vakt 24 tímar um samdøgrið, og hetta er als ikki nøktandi, hvørki fyri læknan ella fyri setanarmyndugleikan, sum er Trivnaðarmálaráðið, sigur Maria á Dul.